

# heilsan sinnið svøvnlagið livihátturin frælsi

## Alt blívur betri tá tú gevst við at roykja

31. mai er altjóða roykfríur dagur. Hevur tú eisini hug at gevast við at roykja? Far inn á **fyribyrg.fo** har finnur tú alt tilfarið frá skeiðnum

**FARVÆL TUBBAK LIVE.**

Fyribyrgingarráðið

Stephanssons Hús





# Tekniskur stjóri til Tórshavnar kommunu

### Ábyrgdarøki

Saman við borgarstjóra, kommunustjóra, trivnaðarstjóra og miðfyrisitingarstjóra mannar tekniski stjórin leiðslutoymið í kommununi og kemur í samstarvi við politiska myndugleikan at raðfesta uppgávurnar og leggja til rættis kommunalu ætlanirnar.

Tekniski stjórin er ovasti leiðari fyri teknisku fyrisitingini við tilvísing til kommunustjóra og borgarstjóra. Næstu starvsfelagar eru býarverkfrøðingurin og býararkitekturin, sum er byggifulltrúi.

### Arbeiðsuppgávur

Høvuðsuppgávan verður at stjórna og samskipa arbeiðsøkini í teknisku umsitingini og hava umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina um hendi.

Tekniski stjórin er sambindingarliður millum teknisku umsitingina og politisku skipanina og skal ansa eftir, at lógir, reglugerðir og samtyktir verða fylgdar.

Tekniski stjórin skal eisini tryggja, at fyrisitingin hevur gott samskifti við borgaran, viðskiftafólk og landsstovnar.

### Førleikakrøv

Vit sóknast eftir einum stjóra við akademiskari útbúgving, sum hevur áhuga fyri og hollan fíggjarligan og fyrisitingarligan kunnleika. Arbeiðið krevur virðing fyri og fatan av politisku skipanini.

Harumframt vænta vit, at stjórin hevur leiðsluroyndir og er førur fyri at taka avgerðir. Vit vænta eisini, at hann er áhugaður í býarskipanarligum viðurskiftum, býarvarðveiting, náttúru- og umhvørvismálum og tekniska økinum sum heild. Vit leggja stóran dent á góð samstarvsevni og ein jaligan hugburð.

### Lønar- og setanarviðurskifti

Starvið er tænastumannastarv og verður lønt í 38. lønarflokki við tvey ára royndartíð.

### Umsókn

Umsóknir saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 6. juni 2006 kl. 12.00. Viðmerkið umsóknina: *Tekniskur stjóri.*

Um tú ynskir at fáa meira at vita um starvið kanst tú venda tær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tlf. 30 20 10.

Tórshavnar kommuna

REPROZ